Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Aksel V. Johannesen, løgtingsmaður

Svarari: Helgi Abrahamsen, landsstýrismaður í umhvørvis- og vinnumálum

Evni: Heimasíða hjá Visit Faroe Islands

Spurningar:

1. Fer landsstýrismaðurin at seta í verk eina kanning sum vísir, hvussu tann almenna síðan www.bygdagotur.fo er gjørd, soleiðis at staðfestast kann, um ákærurnar um kopiering, framd av einum almennum stovni, hava hald í veruleikanum ella ikki?

Viðmerkingar:
Í Degi & Viku 26. mars 2021 var eitt innslag um nýggju heimasíðuna www.bygdagotur.fo hjá Visit Faroe Islands. Har var millum annað greitt frá, at henda heimasíða er eitt kopi av heimasíðuni hjá einum íverksetara, www.hikewithpol.fo.

Tá ein hyggur at hesum heimasíðum skerst ikki burtur, at tær líkjast nógv. Her er talan um ein persón, sum hevur nýtt sera nógva tíð og orku til at menna sína síðu, og tað er álvarsamt, um ein almennur stovnur ikki bara kappast móti eini lítlari privatari fyritøku við almennum pengum, men enntá ger tað við at kopiera tað, sum tann lítla fyritøkan hevur framleitt og eigur.

At hetta er tað, sum er hent, varð afturvíst av Visit Faroe Islands í Degi & Viku 26. mars 2021. Men í tí stutta innslagnum bar ikki til at lýsa nakað ella leggja prógv fram. Tí endaði tað sum pástandur móti pástandi.

Tað skuldi kortini verið lætt at funnið útav, hvør hevur rætt. Tað ber til at kanna og lýsa, hvussu tann almenna síðan er gjørd og sammeta hana við ta privatu síðuna. Tað er óheppið, at ein almennur stovnur er undir illgruna fyri at hava kopierað hugskot og tilfar hjá eini privatari fyritøku. At ákærurnar og illgrunin um hetta framvegis hanga í luftini er til skaða fyri allar partar.

Á Løgtingi, 4. mai 2021

Aksel V. Johannesen